## DAGSINS MEINING

# Menningarhjálp

Hóast játtanin á fíggjarlógaruppskotinum til menningarhjálp bert er 300.000 kr., so hevur henda játtan stóran áhuga millum tingmenn. Játtanin elvdi eisini til eitt áhugavert orðaskifti á tingi henda dagin, har tingmenn og løgmaður dúgliga tóku lut. Niðurstøðurnar av orðaskiftinum vóru fleiri. Ein var, at 300.000 kr er alt ov lítið hjá einum so ríkum landi sum Føroyar at lata í menningarhjálp. Hinvegin skiltist á fleiri, at komu vit í eina støðu, sum kravdi eina størri føroyska hjálp í stundini, so var møguleikin at játta eina størri upphædd við fíggjarnevndarskjali. Hetta er dámligt og tænir tingmonnum og løgmanni til æru.

Ein onnur niðurstøða var, at nú var stundin komin at gera av, hvussu vit framyvir skulu lata okkara (vónandi væl størri) menningarhjálp. Skulu vit halda okkum til akutta humanitera hjálp, har ein álvarsom neyðstøða knappliga kemur í? Ella skulu vit fara undir at veita eina skipaða menningarhjálp, alt meðan vit royna at koma upp á sama játtanarstøði sum t.d. Noreg? Harnæst varð spurt, hvussu vit skulu játta, um vit fara undir skipaða menningarhjálp. Skulu vit velja at statsa uppá heilt ávíst land ella lond og veita okkara skipaðu menningarhjálp umvegis okkara egna heimliga vinnulív? Hesir og fleiri líknandi spurningar vórðu settir fram undir orðaskiftinum um fíggjarlógina fyri 2004.

Vit loyva okkum at halda, at tað gevst einki einvíst svar til hesar spurningar, tí sjálvsagt eigur eitt ríkt og framkomið land at kunnu veita akutta so væl sum skipaða menningarhjálp. Tann mest átrokandi neyðstøðan í løtuni er í útsynningspartinum av Sudan. Her er kristni minnilutin av afrikanskum uppruna fyri ræðuligum forfylgingum frá arabiska og muslimska meirilutanum. Sambært NRK mánamorgunin er ein millión menniskju um at doyggja í hungri. Neyðin kemur sum nevnt av borgarakrígnum, har muslimski meirilutin fyri norðan er farin undir miðvía etniska reinskan av kristna fólkinum fyri sunnan. Løgtingið átti tí alt fyri eitt at játta eina hóskandi upphædd t.d. í samstarvi við norsku hjálpini, ið er tann mest effektiva heiminum. Samstundis eigur landsstýrið at orða ein politikk fyri menningarhjálp, sum eisini fevnir um luttøka av føroyskum vinnulívi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til Herman Oskarsson í Sosialinum seinasta leygardag

**Edmund Joensen**



Formaður Búskaparráðsins, ovasti búskaparligi ráðgevin hjá landsstýri og løgtingi, búskaparfrøðingurin Herman Oskarsson tekur rívan til í Sosialinum um føroyska búskapin.

Hesin framúrskarandi búskaparfrøðingurin vísir á, "at fólk ikki fara at minnast undanfarnu samgongu sum fullveldissamgonguna, men heldur sum ta samgonguna, ið framdi samtyktu broytingarnar í almennu fyrisitingini og økti útreiðslurnar við einari milliard." (rætta talið er munandi hægri).

Hesa niðurstøðu kemur búskaparfrøðingurin til, aftaná at hava boðað frá, at orsøkin til milliarda útreiðsluvøksturin er at uppskotið sum varð samtykt í tinginum eftir kreppuna, við Norman Christensen og Edmundi Joensen á odda, ikki er sett í verk fyrr enn í undanfarnu samgongu.

Til hetta er at siga, at samtyktu bygnaðarbroytingarnar vóru framdar frá 1994 til 1998. Høvuðsumsitingin við løgmansstjóra og 5 aðalstjórum, var samanlagt ein rímilig og eftir umstøðunum bilig umsiting, sum í 1998 kostaði 52 milliónir krónur.

At so fullveldissamgongan aftaná økti talið upp til 9 stýrir, og økti kostnaðin upp til 142 milliónir krónur, sum sjálvandi er alt ov nógv, kann hvørki lastast Norman Christensen ella undirritaða.

Men hetta var bara ein evarska lítil partur av samlaðu útreiðsluøkingini hjá fullveldissamgonguni. Hevði fullveldissamgongan bert økt um útreiðslur til miðfyrisitingina, hevði onki hall verið á fíggjarlógini fyri 2004, men yvirskot.

Um hetta var einasti og mest margháttligi framburðurin í samrøðuni í Sosialinum hevði eg tikið sum eina sjálvfylgju, at búskaparfrøðingurin mikli var skeivt endurgivin. Men restin av samrøðuni er eisini líka óskiljandi.

"**Hallið er í ordan**" sigur hann um eitt minus uppá 277 milliónir krónur á fíggjarlógini fyri 2004. Eisini sigur hann, at tað er skaðiligt at tosa um hall ella avlop í staðin fyri at tosa um hvørjar tænastur verða betri. Tað ber ikki til at nýta hugsunarháttin í einari fyritøku, tí hon helst skal vinna pening, meðan tað almenna, ístaðin fyri at hugsa um undirskot, skal hugsa um tænastustøðið, sigur Herman Oskarsson. Hann sigur eisini, at tað almenna fer prinsipielt ikki á heysin. Hetta tykist vera galdandi líka mikið støddina av almennu útreiðsl-unum, og líkamikið støddina frá blokkstuðuli og inntøkum frá vinnuni v.m.

Um hetta er at siga, at hevur tað almenna ikki inntøkur til at dekka sínar útreiðslur við, so steðgar tað sjálvandi eisini upp. Royndirnar frá fyrst í nítiárunum hava vit jú f153ískar í minninum.

Vit eru nøkur sum halda, at tað ikki er so stórur munur á einari fyritøku og tí almenna sum búskaparfrøðingurin vil gera tað til. Felags fyri fyritøkuna og landið er, at útreiðslurnar helst skulu mótsvarast av inntøkum - tað havi eg sjálvur altíð hildið. Eg eri eisini av teirri fatan, at økt tænastustøði krevur øktar inntøkur.

**Føroyski búskapurin er sera einfaldur**, sigur Herman Oskarsson. "Fara fiskaprísirnir upp, gongur væl, og fara teir niður, eru vit prísgivin". Saman við alivinnuni er hetta einfalda orsøkin til hallið, slær búskaparfrøðingurin fast.

Tað framgongur púra greitt av samrøðuni, at niðurskurðurin í blokkinum eftir hansara tykki ikki hevur nakran fíggjarligan týdning og tí ikki er ein av orsøkunum til hallið á fíggjarlógini. "Tað er og vil altíð vera ein politiskur og hugsjónarligur spurningur, um hann skuldi verið skerdur ella ikki", sigur Oskarsson. Tað framgongur eisini týðuliga, at vøksturin í almennu útreiðslunum uppá meira enn eina milliard heldur ikki er ein orsøk til at fíggjarlógin vísir hall. Nei vinnan fær einsamøll alla skyldina av hallinum á fíggjarlógini fyri 2004. Hon er einfalda orsøkin.

Ofta verður sagt, at búskaparfrøði er alt ov torskild fyri meiniga mannin. Hóast tað loyvi eg mær at tvíhalda um, at um almennu útreiðslurnar bert vóru øktar við 143 minus 52 milliónum krónum, so høvdu vit framhaldandi eitt risastórt yvirskot á fíggjarlógini, fyri ikki at tala um úrslitið, var blokkstuðulin ikki skerdur. Við hesum fortreytum hevði yvirskotið framvegis verið stórt, eisini við verandi trupulleikum hjá vinnuni.

# Ein tøkk til FSF!

**Heri Simonsen og Jóhan Petur Johannesen**





Undirritaðu skrivaðu eitt lesarabræv fyri nøkrum vikum síðani har vit heittu á FSF, um at geva trúgvum landsliðsstuðlum møguleikan at keypa eitt sesongkort til allar heimadystirnar hjá FSF.

FSF hevur tikið hetta til eftirtektar, og hevur givið okkum møguleikan at keypa eitt sesongkort til eina rímuliga peningaupphædd. Hetta skal FSF-leiðslan hava eina stóra tøkk fyri. Vit fara kortini at heita á FSF um ikki at binda seg til talið: 1.000 sesongkort, um so er at fleiri enn 1.000 fólk hava eitt ynski um at ogna sær eitt tílíkt sesongkort!


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Vælkomin Mikladals kommuna

**Jákup Petersen**



Fyri nøkrum døgum síðani frættist, at Mikladals og Klaksvíkar kommuna høvdu avgjørt at kasta saman 1. jan. 2005. Hetta byggir á sáttmála sum frammanundan er samtyktur í Klaksvík og í Mikladali.

Eg má siga at tað fløvar, at Mikladalur og Trøllanes vilja ganga saman við Klaksvík á tí kommunala økinum. Eg havi ættarbond úr Mikladali, og eri sera errin av hesum. Pápi mín kemur úr Mikladali og eg havi altíð sæð nakað stórt í hesum fólki, sum undir sera truplum viðurskiftum kundu byggja land og menna seg millum tey fremstu í Føroyum á fleiri økjum.

Eg veit, at tað hevur verið gott samband millum Kalsoy og Eysturoy í fleiri mannaminni, og at fleiri bond í gomlum døgum hava verið knýtt tann vegin. Men seinastu tíðina hava kalsingarnir, sum mikladalsmenn ofta vóru róptir, alt meira vent sær móti økinum Norðuri í Vági.

Eg kalli meg fyri klaksvíking, og eri sera glaður fyri, at fleiri kalsingarnir saman við fólki úr øðrum bygdum í Norðoyggjum valdu at seta seg niður í Klaksvík. Tað vóru hesi fólk, sum fyri ein stóran part byggdu Klakksvík. Tað varð ein sovorðin arbeiðshugur, hugflog, hegni og skil í hesum fólki, og tað skapti ein framburð í Klaksvík, sum valla hevur verið at síggja aðrastaðni í Føroyum. Og hesin framburður hevur hildið seg til henda dag.

Vit vita øll, hvussu frammarlaga kalsingarnir eru á mentunarøkinum. Innan list mugu teir nokk metast millum teir fremstu í Føroyum.

Eg havi hoyrt pápa mín siga frá, hvussu smiðjurnar í Mikladali vóru millum tær fremstu í Føroyum og langt frammanfyri tað ein kundi gera Norðuri í Vági. At tað longu í Innustovusmiðjuni í 1890 vóru gjørdir tríggir stórir kranar av sverum jarnbreytaskinnarum, har ein varð til Mikladals, ein til Viðareiðis og ein fór vestur til Gjáar. Smiðjurnar høvdu lærlingar, sum síðani gjørdust sjálvstøðugir smiðir um alt Føroya land. Og at tað í Norðnástovusmiðjuni vóru gjørdir líggjar, bátaseymir, knívar, grev, saksar og skræddarasaksar til ymisk støð í Føroyum. Soleiðis, at ambolturin sang bæði tíðliga á morgni og seint á kvøldi.

Pápi hevur eisini sagt mær eitt og annað um bátasmíð. Varð ikki heilt sørur sjálvur, tá tað kom til at smíða bátar og pápi hansara Poul Andrias Petersen hevðið eisini lært hann eitt og annað. Tá vóru bátar gørdir í Mikladali til allar oyggjar í Føroyum og fleiri lærlingar úr Mikladali vóru síðani sjálvstøðugir kring landið. So vítt eg veit hevur Niklas í Koltri lært eitt og annað frá pápa sínum, sum smíðaði saman við Jógvani í Norðnástovu. Tað sigst, at Hanus í Norðnástovu smíðaði bát millum svøvnar. Hann gjørdi eitt fýramannafar á Syðradali eitt sumarið og varð ongantíð í song. Hvíldi seg bert eina løtu í hølvispønunum um hádimmið, tað varð alt.

Hetta er fólkið, sum hevur bygt Klakksvík. At tit hava valt at varðveita sambandið til Klaksvíkar ber boð um áhaldandi vinalag, dirvi og framburð. Og skuldið tað verið so, at Klaksvíkin fekk høvi til at hjálpa til í Mikladali ella Trøllanesi og soleiðis goldið ein part aftur av øllum tí, sum hesar bygdir hava latið til Klaksvíkar gjøgnum tíðirnar, so hevðið tað glett meg ómetaligt.

Vinirnir kalsingar, vælkomnir í kommununa. Vit eru errin av tykkum!



# Nú kemur Mr. Puffman

FLØGUÚTGÁVA

*Tíðindaskriv*

Orkestrið Headache Blues Treo, sum seinasta hálva annað árið hevur spælt sín egna orkuløddа bluestónleik runt í landinum, eru nú um at veroa klárir vio fløgu. Fólk flest kenna hendan bólk frá Prix FO, Ólavsøkukonsertini og mongum øðrum konsertum og tiltøkum.

Headache Blues Treo eru Uni R. Debess, Edvard N. Debess og Rógvi á Rógvu. Hesir tríggir hava skapt sín egna tónleikastíl við rótunum í amerikanskum bluestónleiki.

Fyri hálvum ári síðani fóru mennirnir í HBT undir at spæla inn fløgu, og nú er við at vera komið undir land við henni. Hon er spæld inn í Føroyum og ljóðblandað í Íslandi, av Guðmundi Petursson og Helga Smára Gunnarson.

Løgini á fløguni Mr. Puffman eru øll í kenda HBT-stílinum, og sostatt sera orkufull. Á onkrum av løgunum hava HBT fingið stuðul frá Búa E. Dam, guitar og Unn Paturson, sang

Fløgan Mr. Puffman kemur út í mei og tað er Landing Duck Records sum stendur fyri útgávuni.

Heimasíðan hjá bólkinum er á: www.headacheblues.com


Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg


# Aftursvar til Jonnu Justinussen, fyrrverandi lærara í Mikladal

**Abraham Mikladal**



Tú spyrt um tað er mátin, at gera tað meira liviligt hjá fólki á útoyggj, við at taka til orðana í bløðunum. Eg eri rættuliga vísur í at tað er ein av fleiri gongdum leiðum.

Tað hevur stóran týdning at taka støðu og verða virkin samfelagsborgari.

Tað eru alt ov fá, sum tora at trýna fram og tosa Roma ímóti ella siga sína hugsan um ymisk samfelagsviðurskifti. Men eg skilji tað væl tí prísurin kann verða "berufsverbot" og marginalisering í samfelagnum.

Eg hevði og havi tað støðu, at skúlin á Trøllanesi átti at verið tikin í nýtslu aftur og gjørdi vart við hetta í bløðunum. Nú havi eg so tala at, tí hesi "somu" fáu fólk ikki vilja nýta demokratiskan framferðarhátt og skriva út fólkaatkvøðu um samanlegging við Kl. Kommunu.

Talan hevur ikki verið um nakra útspilling ella ljót lesarabrøv. Havi lagt navn til tað, ið eg havi skriva og tey, ið eg havi nevnt við navni eru at meta sum almennir persónar, fyrr- og núverandi bygdaráðslimir í Mikladals kommunu.

Hinvegin hava eg og onnur, ið hava tala fyri at taka skúlan á Trøllanesi í nýtslu aftur, fingið dulnevnd brøv, við útspillandi og hóttandi innihaldi.

Lat meg gera greitt at Mikladal og Trøllanes skulu verða meir enn vælkomin í Kl. Kommunu. Men eg haldi fast við at tað skal gerast við eini fólkaatkvøðu.

Tey, ið sita í bygdaráðnum í Mikladali, fóru ikki uppá val í 2000 fyri at leggja saman við Kl. Kommunu! Sostatt hava tey ikki biði borgararnar um hesa heimild.

Allar aðrar kommunur, sum er upploystar hava havt fólkaatkvøðu. Eisini Elduvík og Hellurnar, ið ætla at leggja saman við Runavík, fara at halda fólkaatkvøðu tann 17. apríl.

Eg kann eisini kunna teg um at:

- 2 av 3 bygdaráðslimum í Mikladali hava innlima Mikladals kommunu í Kl. Kommunu. (tann eini ynskti fólkaatkvøðu, og tað skal hon hava rós fyri)
- Seinni býráðsfundurin í Klaksvík, um samanleggingina, var niðurlagdur, tí at borgarstjórin, vegna eitt samt býráð skuldi heita á bygdaráði í Mikladals kommunu um at halda fólkaatkvøðu, men bygdaráðsformaðurin í Mikladali var ikki til at vika.

Ímynda tær at 6 býráðslimir høvdu innlima Kl. Kommunu í Tórshavnar Kommunu. Tað hevði ikki sloppi óátala aftur við borðinum. Tað hevði snøgt sagt ikki verið góðtikið av nøkrum.

Tað eru tveir menn í bygdaráðnum í Mikladali, sum ikki hava diplomatiskan og fólkaræðisligan hugburð. Teir ynskja hvørki at fara til val í heyst ella at skriva út fólkaatkvøðu um samanlegging.

Grundgeving teirra er at Kl. Kommuna heldur ikki hevur fólkaatkvøðu.

Men tað heldur ikki.

Kl. Kommuna frásigur sær eingi rættindi ella heimildir, men tað ger Mikladals kommuna. Mikladals Kommuna verður strika, sum kommuna.

Og tann brennandi spurningurin er: Hví vilja hesir báðir ikki hava eina fólkaatkvøðu?? Er tað tí eitthvørt stendur í sáttmálunum, sum teir meta ferð at gera tað at ein meiriluti hevði verið ímóti? Er tað skúlamálið, sum spøkir?

Er sáttmálin millum Kl. Kommunu og Mikladals kommunu, við ØLLUM undirskjølum, gjørdir borgarunum í Mikladals Kommunu kunnigir? Er tað samlaða sáttmálaverki sent borgarunum ella sligið upp í kunngerðar talvunum í bygdunum báðum?

Síðani sigur tú, at eg skildi lesarunum at fortelja teimum at kona mín er Olga Biskopstø. Tað havi eg ongan trupulleika av, tí eg havi stóra virðing fyri konu míni. Hon er ein sjálvstøðugur, virkin og vælmeintur persónur, sum hevur brúkt nógva tíð tey seinastu 4 árini til at tosa søk útoyggjana, fyri stórt sæð onga samsýning

Hon er ikki forkvinna í Útoyggjafelagnum, men samskipari. Útoyggjafelagið hevur eina nevnd við Óla Jákup úr Dímun, sum formanni. Sjálvur eigi eg ongan leiklut í Útoyggjafelagnum.

Í ósemjuni um skúlan á Trøllanesi, royndi hon semju millum partarnar - púra sjálvboðin, men hon, eins og hini sum royndu, kom ikki á mál, orsaka av eini sera stívrendari og ódiplomatiskari støðu hjá teimum "somu" fáu í Mikladali og har ímillum var tú, tá.

Kann nevna til síðst at hóast tey á Trøllanesi hava skriva fleiri brøv til bygdaráði í Mikladali og biði um fund o.a., so er einki svar komi - kann tað sigast at vera semjusøkjandi og í trá við demokratiska hugburð?